

## Rógvi vann á Albert

Eitt mál kom í dystinum ímillum KR og Njarðvík um vikuskiftið, og málið fekk KR. Rógvi Jacobsen spældi allan dystin á liðnum hjá KR, og í málinum hjá Njarðvík var ein annar kenningur í Føroyum. Albert Sævarsson, sum hevur vart málið hjá B68, er málmaður hjá Njarðvík, og hann spældi ein sera góðan dyst ímóti KR, ið var stórfavorittur til at vinna. Einasta málið í dystinum skoraði KR beint fyri hálvleik, tá ið Rógvi Jacobsen sendi inn fyri til liðfelagan Bjarólfur Lárusson, ið skoraði.

## Nesta er ivamsamur

Verjuálitið hjá italska landsliðnum, Alessandro Nesta, er ivasamur til hálvfinaluna ímóti Týsklandi týskvøldið. Nesta hevur ikki spælt við í seinastu tveimum dystunum hjá Italia í HM, og tað er ikki sannlíkt, at hann verður aftur á vøllinum ímóti Týsklandi í morgin. Tað er ein gamal skaði í lúskuni, sum nú órógvar Nesta.

- Møguleikarnir hjá honum fyri at spæla ímóti Týsklandi eru sera smáir, sigur ein talsmaður fyri italska landsliðið.

Nesta hevur spælt í trimum HM-endaspølum, og í øllum kappingunum hevur hann sitið uttanfyri onkrar dystir við skaða.

ÍF-VB 1-2 (0-2):

# Varmastevnu-hýrurin fór í botn

*ÍF*

*VB*



*Fyri aðru ferð í ár fór VB/Sumba úr Fuglafirði við øllum stigunum. Eitt úrslit, sum aftur sendi ÍF niður í botnin á stigatalvuni*

*savnsmynd*

**Suðuroyingar vunnu enn einaferð 2-1 sigur í Fuglafirði. Við trimum nýggjum monnum á liðnum hildu teir fast um leiðsluna, sum teir vunnu sær tíðliga í dystinum**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hýrurin á heimaliðnum var einki serligur, tá dysturin í Fuglafirði var blásturin av leygardagin. Gaman í var varmakelda á skránni, men trupult var at síggja nakran veitsluróm kring vøllin.

Eins og teir gjørdu tað fyrr í ár, so hevði ÍF júst tapt heima- og botndyst móti VB/Sumba, og fyribils er avleiðingin, at ÍF er mest sum avbyrgt í botninum ádi stigatalvuni.

### Mistak og perla

Nakað soleiðis ljóðaði millumyvirskriftin, tá vit fyrr í ár lýstu teir bæði málini, sum VB/Sumba ta ferðina skoraði í Fuglafirði, og sama yvirskrift tolir væl eina endurtøku hesaferð.

Fuglfirðingar vóru annars teir, sum byrjaðu dystin betur. Fyrsta góða korterið var talan um nógv trýst, og møguleikar fingu teir eisini. Nærri enn einum skoti á stólpan og eini røð av hornaspørkum komu teir tó ikki, og brádliga hevði VB/Sumba tvær ferðir revsað teir.

Fyrra málið hjá gestunum var úrslit av alt annað enn sannførandi verjuspælið frá vertunum. Verjan fekk als ikki beint bóltin burtur, og so var púra blanki Birgir Jørgensen skjótur at taka av.

Stutt seinni økti VB/Sumba til 2-0, og tá var talan um eina perlu. Uppspælið gekk skjótt upp í síðuni, og tá bólturin varð sendir innfyri, kundi Evrard Ble sera vakurt kundi stýra í málhornið við høvdinum.

### Trýst uttan úrslit

Leiðslan gav gestunum møguleikan at spæla júst tað spælið, sum teir høvdu í kvittanunum. Teir løgdu seg djúpt á vøllinum, og dúvaðu upp á kontra, meðan tað so var til fuglfirðingar at skapa sær neyðuga trýstið.

Fyri ein part kom hetta eisini, men tað var tó sjáldan, at tað gjørdist heilt vandamikið. Tíðliga í seinna hálvleiki fekk seinni málskjúttin hjá VB/Sumba sítt næsta gula kort í dystinum, og so máttu gestirnir spæla við tíggju monnum, tað sum eftir var av dystinum.

Fuglfirðingarnir kundu nú trýsta enn meira, men tað var ikki fyrr enn í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, at munurin minkaði. Bartal Eliasen varð trýstur í ryggin í brotsteiginum, og so var brotsspark. Tað setti Bartal sjálvur trygt í kassan, men bólturin var ikki meira enn givin upp, tá dómarin blásti seinasta bríkslið í dystinum, og so var einsamalli botnsessurin kaldur veruleiki í Fuglafirði.

### Framgongdin steðgaði

Á sín hátt tóktist hetta eisini markera ein enda á framgongdini, sum ÍF hevur havt seinnu umførini. Liðið hevur annars savnað sær nógv stig hesar seinastu dystirnar og tóktist vera ávegis úr botninum. Greiða tapið fyri B36 seinast var kanska ein ímynd av, at framgongdin nú var steðga, og við tapinum sunnudagin tykist aftur standa púrasta fast.

Skulu fuglfirðingar reisa seg, so er eisini alneyðugt, at hetta verður gjørt sum skjótast. Longu komandi sunnudag stendur nýggj botnuppgerð á skránni, tá vitjað verður á Toftum, og kravið til ta uppgerðina er so púrasta greitt.

VB/Sumba hevur tá heimadyst móti HB, sum uttan iva hevur ætlanir um at reisa seg eftir dygga ósigurin í grannauppgerðini. Lítið er tó at ivast í, at vónrinar í Suðuroynni ikki eru heilt ongar til dystin. Tríggir nýggir mans vóru á liðnum leygardagin, og sum skilst, so stóðu hesir seg sera væl. Ikki minst nýggi verjuspælarin og Tummas Pauli Olsen, sum er komin úr B71.

## Harmiligt tap

– Vit eru sjálvandi ikki nøgdir eftir eitt slíkt tap. Talan er um ein dyst, sum vit eiga – og í øllum førum skulu – vinna.

Petur Simonsen, venjari hjá ÍF, var púrasta greiður um, at talan ikki var um nóg gott úrslit, sum liðið hevði fingið leygardagin, tá teir taptu móti VB/Sumba.

Partvíst, so mundi hetta úrslit eisini tileinkisgera góðu úrslitini, sum ÍF hevur havt seinasta góða mánaðin, og eisini hetta hevði kanska sínar orsøkir, helt Petur.

– Tað vísir í øllum førum, at vit eru sera viðbreknir, tá lyklaspælarar eru burturfrá. Hesa ferð var Alexander úti við skaða, og tað merkti liðið alt fyri eitt.

– Sjávlandi setir úrslitið okkum í eina trupla støðu, men vit mugu so bara vit, um vit klára at arbeiða okkum úr hesum, heldur Petur Simonsen, sum nú setir fokus á næstu uppgávuna, sum verður á Toftum komandi sunnudag.

## Tríggir javnir í oddinum

Tað gongur sera javnt fyri seg í HM-tippingarkappingini hjá Sosialinum og Formula.fo.

Nú bert fýra dystir eru eftir at spæla, eru tríggir tipparar enn púrasta javnir í oddinum, og beint í hølunum á teimum eru fleiri, sum eisini gera um seg. Millum annað Regin Sivertsen, sum í fjórðingsfinalunum skoraði ikki færri enn 17 av 24 møguligum stigum.

**Støðan eftir fjórðingsfinalurnar í HM er hendan:**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Jákup Ósá | 38 | 6 | Áki Andreasen | 34 |
| 1 | Magnus Simonsen | 38 | 6 | Jóan Pauli Jespersen | 34 |
| 3 | Róaldur Jacobsen | 38 | 9 | Rúni Mortensen | 33 |
| 4 | Debes Danielsen | 37 | 10 | Regin Davidsen | 32 |
| 5 | Regin Sivertsen | 36 | 10 | Áki Johansen | 32 |
| 6 | Regnar Háskor | 34 | 10 | John Michael Petersen | 32 |